# Góðar umstøður at súkkla




Hjá teimum sum dáma væl at súkkla, er Danmark uttan iva eitt tað besta egnaða og umtókta landið til hetta frítíðarítrivið.

Runt alt Danmark finnast omanfyri 10.000 kilometrar av súkklurásum, har ein sleppur undan at fara upp um fjøll og skørð, men fær hinvegin vakra náttúru við sær á túrinum.

Ein annar fyrimunur er, at tað er altíð stuttur vegur til strondina um tú hevur hug at svala tær á, ella til næsta bý um ein skal keypa sær okkurt.

Og ynskir ein at spara eitt sindur uppá megina, kann ein taka súkkluna við tokinum og soleiðis koma skjótari frá einum enda av landinum í hin.

Ein fyrimunur hjá teim súkklandi er, at tey eru væl lýdd í ferðsluni, av teirri einfaldu orsøk at tey eru so mong í tali.

Danir elskar súkklur sínar og munnu teljast millum mest súkklandi fólkini í heiminum. Tað sær ein ikki minst í gøtumyndini í Keypmannahavn, har súkklurásirnar verða nógv brúktar árið runt.

Um summarið verður eisini skipað fyri fleiri súkklukappingum í Danmark. Millum tær størru kappingarnar er HM í landavegssúkkling ið verður í døgunum 18. til 25. september í ár.

**NÁTTÚRA**

***Meðan tú súkklar á teimum mongu rásunum í Danmark, kann ein samstundis njóta vøkru náttúruna***

